# Leiðari til Virkishúsið fyri Ung í Klaksvík

Klaksvíkar kommuna er í ferð við at seta á stovn eitt virkishús fyri ung í Klaksvík og søkir í hesum sambandi eftir leiðara.

Talan er um eitt fulltíðarstarv.

**Høvuðsuppgávurnar eru:**
- at hava ábyrgd av dagliga virkseminum
- at hava ábyrgd av fyristingini og fíggjarligu viðurskiftunum í virkishúsinum

**Aðrar uppgávur eru:**
- at skapa møguleika hjá børnum og ungum fyri mennandi upplivingum í rúsfríum umhvørvi
- at skipa fyri tiltøkum til frama fyri børn og ung í Klaksvíkar kommunu
- fylgja við og kunna seg um menning, sum fer fram á økinum
- samstarva við feløg og einstaklingar um felags mál
- at verða við í norðurlendskum samstarvi

**Vit sóknast eftir persóni, ið:**
- hevur hugsjónir um virksemið í einum barna- og ungdómshúsi
- breiða vitan um ungdómsarbeiði sum heild
- kann ganga á odda og arbeiða sjálvstøðugt
- dugir væl at fyrisita og leiða
- kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og onnur
- dugir at samskifta innan- og uttanhýsis
- hevur náttúrligan myndugleika og ein nútímans leiðslustíl

**Útbúgving/royndir:**
- pedagogur, lærari ella aðra viðkomandi útbúgving
- helst hava royndir innan leiðslu
- kunnleika til EDV

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt spennandi arbeiði við nógvum avbjóðingum
- at verða við frá byrjan og byggja stovnin upp
- góðar samstarvsfelagar

**Setanarviðurskifti:**
- lønar- og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og avvarðandi yrkisfelag
- verður at tola bygnaðarbroytingar
- starvið verður sett skjótast til ber

**Fleiri upplýsingar**
fáast við at venda sær til Jancy Biskopstø Klein sosialdeildarleiðara ella John Færø býráðsskrivara á telefon 41 00 00.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera **Klaksvíkar kommunu, postboks 2, 700 Klaksvík** í hendi í seinasta lagi 23. september 2005.

**Klaksvíkar Kommuna**

# Skrivstovufólk

**Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir skrivstovufólki til umsitingina hjá Heimamissiónini í Nesvík.**
**Starvið er tíðaravmarkað frá uml. 13. september 2005 til 31. juli 2006.**

**Arbeiðið umfatar m.a.:**
- Avgreiða telefon og post.
- Privat skrivari hjá aðalskrivaranum í vanligum samskiftis málum og uppgávum.
- Fyrireika og avgreiða tilfar o.a. til fundir fyri aðalskrivaran.
- Ábyrgd av arkivering.
- Bókhald: Kontering, bókingar og avstemming av konti hjá Heimamissiónini við greinum.
- Umsiting av haldarum av Trúboðanum o.ø., m.a. haldaragjøld, ljóðbond o.a..
- Skráseting og viðlíkahald av stýrum, nevndum, hátíðardøgum o.ø..
- Neyðugt arbeiði í samb. við landstiltøk og summarlegurnar.
- Fyrireika og verða til staðar, til tiltøk ið hoyra undir aðalskrivaran.

**Førleiki:**
- Tekur undir við lógskipanini hjá Heimamissiónini.
- Samstarvsevni, fryntlig/ur fyrikomandi og álítandi.
- Kunnleiki til bókhald og teldur er ein fyrimunur.

**Vit bjóða:**
- eitt innihaldsríkt starv í góðum arbeiðsumhvørvi og góðum starvsfeløgum.

Løn og ferðaendurgjald eftir galdandi skipan.

Umsóknir skulu sendast til:
Heimamissiónin, 437 Nesvík,
viðm. skrivstovustarv.
Freistin at søkja er týsdagin 6. september 2005.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til
Vagn Foldbo, aðalskrivara
tlf. 47 00 00, fax 47 00 01,
t-post: vf@mission.fo

**Kirkjuliga Heimamissiónin**
**FO-437 Nesvík**
**www.mission.fo , hm@mission.fo**

*Kirkjuliga Heimamissiónin er luthersk-evangelisk rørsla innan fólkakirkjuna, ið virkar fyri at breiða út gleðiboðskapin um Jesus Krist og menna felagsskap teirra trúgvandi á landi og sjógvi, heima og úti.*

# Fólk søkist

**Einingaverksmiðjan ehf** søkir eftir fólki at byrja skjótast gjørligt til betongelement framleiðslu.

Vit søkja eftir:
- Tveimum timburmonnum
- Tveimum monnum til stoypiarbeiði
- Einum jarnbindara
- Einum múrara

**Einingaverksmiðjan ehf,**
Breiðhöfða 10, 112 Reykjavik
Tlf: 587-7770, Fax 587-775
Sigurbjörn Óli Ágústsson [soa@ev.is]
www.ev.is

**Húsavarðartænastan**

Jens Kristian Hansen
Bygningssnikkari
Tel. 215590 fax: 315590

Sámal Erik Hentze
Bygnigssnikkari
Tel. 215589

Brattalíð 8 - FO-100 Tórshavn
Teldupostur: hvt@kallnet.fo

**Ogna tær tín egna húsavørð**

## Handverkari til Húsavarðartænastuna

Sókt verður eftir handverkara til Húsavarðartænastuna, at byrja skjótast tilber.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. hesar:**
- Húsavarðartænastu uppgávur.
- Húsaumvælingar bæði stórar og smáar.
- Nýbyggjan/umbyggjan - av ymiskum slagið.
- Umframt aðrar líknandi uppgávur.

**Krøv til tann ið settur verður:**
- Tú er lærdur bygningssnikkari ella timburmaður.
- Hevur koyrikoyrt.
- Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.
- Ert fyrikomandi og ágrýtin.
- Ert skjótur og nærlagdur
- Góð samstarvsevnir.
- Ert málrættaður

**Húsavarðartænastan kann bjóða tær:**
- Eitt spennandi og avbjóðandi starv.
- Samstarv við nógvar ymiskar kundar.
- Fjølbroyttar arbeiðsuppgávur.
- Eitt arbeiðspláss við m.a persónligum eginleikum sum humor og greiða talu.
- Góða løn

Hevur hettar tín áhuga, so ring og spyr eftir Húsavarðartænatuni, Sámal Erik Hentze

**Alt snikkara- og timburarbeiði**

# Landsliðsvenjari í svimjing

Starvið sum venjari hjá svimjilandsliðnum verður við hesum lýst leyst at søkja.

Vit sóknast eftir persóni at standa fyri venjingini av landsliðnum og vænta at hesin hevur viðkomandi útbúgving og/ella skeið.

Vit miða eftir at venjarin kann byrja ikki seinni enn 1. oktober 2005.

Løn og starvstreytir annars vera ásett eftir nærri avtalu.

Hevur hetta tín áhuga, kann tú senda umsókn, saman við viðkomandi prógvum til:

**Svimjisamband Føroya**
Att.: Palli Ziskason
á Brekku 53
FO-700 Klaksvík

Umsóknir skulu vera okkum í hendi innan 15. september 2005.